## Kunnu hitta valevni á Tvøroyri

Felagslistin hevur cafékvøld á Seglloftinum á Tvøroyri í kvøld kl. 19 við bæði skemti og álvara. Skemtið stendur Finn Johannesen fyri. Millum skemtiligu innsløgini telist heiti stólurin, tá Finn "grillar" valevni við borandi og óvæntaðum spurningum. Søren Bruhn kemur at framleggja "Projekt 6000". Um vit nú settu okkum fyri at vit verða 6000 suðuroyingar, hvat krevur tað av okkum. Valevni á Felagslistanum verða at hitta, eins og mikrofonin er tendrað alt kvøldið.

## Kommunuskuldin nógv minkað

Vágs kommuna er ein av teimum 22 kommununum í landinum, sum hevur goldið niður uppá skuldina seinastu árini, skrivaði Dimmalætting í farnu viku við støði í hagtølum frá heimasíðuni hjá Hagstovuni. Í 2000 hevði Vágs Kommuna lán á 73,6 milliónir. Ultimo 2007 var skuldin smáar 46 milliónir. Hetta vil aftur siga, at vágbingar hava goldið 27,7 milliónir í avdráttum niður uppá skuldina hetta tíðarskeiðið. Í meðal hevur Vágs Kommuna goldið 3,5 milliónir av í avdráttum um árið. Sambært grannskoðaðu roknskapunum hjá Vágs Kommunu skyldaði kommunan 1,3 álíkningar ultimo 2007. Samanber ein hetta talið við ár 2000, so sá tað verri út tá, tí tá skyldaði Vágs Kommuna 2,5 álíkningar.

# Oyggin má arbeiða saman

**- Eg rokni við, at eini 70 til 80 prosent av øllum vágbingum eru ímóti samanlegging við Tvøroyri sum støðan er beint nú. Men áðrenn nakað verður gjørt, mugu vit fyrst fáa greið signal um, hvat landsstýrið ætlar, soleiðis at vit fáa viðgjørt hetta málið nærri og kunnað borgararnar meiri um tað, sigur Jógvan Krosslá, býráðslimur í Vági**

KOMMUNUVAL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vágur:** - Hóast mong eru ímóti samanlegging, so er eingin ivi um, at øll er fyri at øll Suðuroyggin má samstarva. Annars fer einki at bera til, sigur Jógvan Krosslá, sum hevur sitið í andstøðuni í Vági seinastu fýra árini.

Treytin fyri øllum hesum samstarvinum er, at landið greitt boðar frá ætlanum sínum um samanlegging av kommunum.

- Ikki fyrrenn eitt greitt politiskt signal verður givið, og ein endaligur dagur verður settur á, kunnu vit av álvara fara til verka við eini tilgongd fram ímóti at leggja oynna saman í eina einstaka kommunu, sigur hann.

Nógvir trupulleikar skulu kortini loysast, áðrenn ein kemur so langt. Ein av hesum trupulleikum er, at báðir býirnir – Vágur og Tvøroyri – eru nærum eins stórir. Var talan hinvegin um at leggja eina lítla kommunu saman við eina størri, var trupulleikin neyvan so stórur sum í hesum førinum.

- Hóast hetta, er neyvan nakar suðringur ímóti at oyggin verður ment í komandi tíðum. Spurningurin er bara, hvussu ein best kann tryggja, at sunnasta oyggj okkara fær eina trygg- ja og bjarta framtíð, slær Jógvan Krosslá fast.

### Lækka inntøkuna

Í seinastuni hevur nógv verið tosað um fíggjarstøðuna hjá Vágs kommunu. Hesa støðuna veit Jógvan Krosslá alt um, tí tá hann gjørdist borgarstjóri í 1993 var inntøkan hjá kommununi 16 mió krónur, samstundis sum ein skuldi gjalda 11 mió í rentum og avdráttum.

Tvey ár seinni varð so skuldin hjá kommununum umløgd, og hetta gjørdist sítt til, at Vágs kommuna – sum hann tekur til – fekk andað eitt sindur.

- Inntøkurnar hava verið vaksandi síðani tá. Okkurt árið vóru tær 32 mió. krónur, og tær hava eisini verið uppi á 36 mió. Komandi ár hava vit sett inntøkurnar til 34 mió krónur. Hetta eigur kommunan at kunna klára seg við, staðfestir andstøðulimurin úr Vági.

Ein fortreyt fyri hesum inntøkum er, at regluligt arbeiði verður á flakavirkinum í býnum, eins og støðan er júst í dag. Beinisvørð kom fyri fáum døgum síðani inn við fiski, og í dag skuldi fiskur eisini koma norðaneftir.

- Vit vóna at tað kann halda fram soleiðis. Tað upplivdu vit seinast, tá kreppan herjaði. Um hetta mundið bæði vónaðu vit og bóðu vit um at meiri fiskur skuldi koma uppá land, og tað eydnaðist tá. Vónandi fer tað eisini at verða so hesaferð, sigur Jógvan Krosslá álvarsamur.

Hann er uppstillaður til býráðsvalið í morgin, og verður hann afturvaldur í morgin hevur hann sett sær fyri, at gera sítt til, at hesar 34 mió verða gagnnýttar á skilabesta hátt.

- Hjá okkum er tað sum alla aðrastaðni: Ein vil gjarna hava, at alt verður gjørt her og nú, men tað hava vit ikki ráð til í løtuni. Ætlanin er í fyrsta lagi at fáa stabilitet í inntøkurnar hjá kommununi og síðani at fara varisliga fram á fíggjarliga økinum, sigur Jógvan Krosslá.

Eitt arbeiðið, ið farast má undir rættiliga skjótt, er bygging av barnagarði í Vági.



*- Vit vóna at fiskavirkið í Vági kann fáa meiri fisk. Á henda hátt kunnu vit tryggja inntøkurnar hjá kommununi, sigur Jógvan Krosslá, býráðslimur í Vági*

# Íløgur stóran týdning fyri Tvøroyri



*Bergur Bærendsen, sum stillar upp á Felagsflokkalistanum á Tvøroyri, heldur, at tað snýr seg um at fáa beinini at ganga, áðrenn farið verður undir kommunusamanlegging*

**Íløgurnar kunnu ikki skerast burtur, tí tær fáa hjólini at mala í samfelagnum. Hetta sigur Bergur Bærendsen, ið stillar upp á Felagsflokkalistanum á Tvøroyri. Trupla fíggjarliga støðan á Tvøroyri hevur fingið sitandi borgarstjóra, Kristin Michelsen, at úttala seg um, at eingir pengar verða til íløgur komandi ár**

KOMMUNUVAL
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Tað er ikki semja, um rætt er at skera íløgurnar burtur, tá fíggjarætlanin fyri komandi ár verður gjørd í Tvøroyrar kommunu. Sitandi borgarstjórin, Kristin Michelsen segði í kommunuvalsblaðnum, sum kom út 7. novembur.

- Vit hava enn ikki havt fíggjarætlanina fyri næsta ár til aðru viðgerð, men tað verða eingir pengar til íløgur næsta ár, sigur hann.

Kommunan hevur staðið við eini skuld, ið fyri nøkrum árum síðan ljóðaði upp á sjey álíkningar, men í dag svara til eina álíkning.

Fólkafloksmaðurin, Bergur Bærendsen, stillar upp fyri Felagsflokkalistan. Han ynskir ikki at halda ta fíggjarligu gongd, sum sitandi borgarstjóri leggur upp til.

- Tað er ein spurningur um raðfesting, og tí mugu vit eisini hyggja at rakstrinum. Spurningurin er, um kommunan er rætt rikin seinastu árini, sigur hann.

Við tillagingum á rakstrarøkinum hevði borið til at loyst pening, sum síðan verður nýttur til íløgur, leggur hann afturat um fíggjarætlanina.

Nógvar íløgur eru, sum skulu gerast, metir hann. Øki sum rørleggingar, vegir, skúlaøkið og mentan kunnu ikki bíða. Tvøroyri hevur drigið ein tungan búskap, orsakað av stórari skuld, men við at steðga íløgunum fer búskapurin at steðga.

Samstarv fyri samanlegging

Bergur Bærendsen heldur, at tað snýr seg um at fáa beinini at ganga, áðrenn farið verður undir kommunusamanlegging.

Nógv tos hevur verið um at leggja kommunurnar í Suðuroynni saman. Kristin Michelsen metir tað vera alneyðugt fyri Suðuroynna í hesum tíðum at leggja saman. Sterkar ósemjur millum norðaru og sunnaru helvt gera eina samanlegging sera trupla.

Bergur Bærendsen vil ikki afturvísa, at nógv kann vera at spara við eini samanlegging, og hetta er eisini eitt mál, ið hann ynskir at arbeiða fyri. Samstarva kommunurnar, eru nógvir pengar at spara í til dømis rakstrinum.

Sjálvt um kommunur kring alt landið í heilum leggja saman, er støðan ikki heilt so einføld í Suðuroynni, greiðir hann frá. Aðrar kommunur eru lagdar saman og eru síðan komnar ásamt um samstarv á ymsum økjum, men eftir hansara tykki átti samstarvið at verið hitt fyrsta at fingið upp á pláss.

- Tað hevði møguliga borið til við samanlegging fyrst, og so latið samstarvið komið av sær sjálvum, men ein ógvuslig polarisering er ímillum báðar hálvurnar av Suðuroynni. Politikararnir mugu seta seg niður og hyggja inn í eyguni á hvørjum øðrum og byrja við samstarvi. Tað ber væl til at seta eitt dato á fyri samanlegging, men best hevði verið at lært beinini at gingið fyrst, sigur hann.

### Støðan

Tvøroyrar kommuna hevur staðið í stórari skuld í fleiri ár, men í ár er skuldin minni, enn hon nakrantíð hevur verið. At sitandi borgarstjóri sigur, at neyðugt er at skera íløgurnar burtur, metir Bergur Bærentsen vera at gera ov nóg av.

- Tvøroyrar kommuna hevur góðar, sterkar inntøkur, sum kunnu bera, sigur hann.